# Ársfrágreiðing 2007



Grivið verður út til skúlan í Liberia	Mynd: ABC-barnahjálp

*Uttanríkisráðið*
*Altjóða menningarsamstarv og neyðhjálp*

Formæli....3

Endamál og virksemi....4
Virksemi nevndarinnar....4
Hvar fer menningarhjálpin ?....5

Lond....6
Indonesia - Menning av fiskivinnumarknaði og trygd á sjónum....6
Kenja - Fótbóltsskúli....7
DR Kongo - Hús í Kongo....8
Liberia - Skúli í Liberia....9
Senegal - Matur....10
Tanzania - Barnagarðsskúli í Kobaha økinum....11
Palau - Oljuumsiting....11
Indonesia - Verkætlan um móðurmjólk í Jakarta....12
Annað....12

Samstarvspartar....14
Mercy Corps....14
Center for Voksenuddannelse og Dansk Bold Union....14
ADRA (Adventist Development and Relief Agency)....14
ABC-barnahjálpin í Føroyum....14
MYODA (Mkuza Youth Development Association)....14
World Food Programme....14
Reyði Krossur....14

Neyðhjálp 2007....15
Hungur í Sudan....15
Jarðskjálvti í Peru....15
Ódnin Sidr í Bangladesh....15

Fíggjarnýtsla....16

Lóg um altjóða menningarsamstarv....17

# Formæli

Hetta er onnur ársfrágreiðing um menningarsamstarv og neyðhjálp.

Í ár hava vit gjørt okkum enn fleiri royndir innan menningarsamstarv. Vit hava verið við í sjey ymsum verkætlanum, og hava gjørt avtalu um, at Trygdarmiðstøðin í Klaksvík veitir ráðgeving og upplæring um trygd á sjónum í Aceh landslutinum í Indonesien. Aceh landsluturin var sera hart raktur av Tsunami flóðalduni fyrsta jóladag í 2004.

Vit eru eisini so smátt farin at fáa aftur frágreiðingar frá stuðulsmóttakarunum, har greitt er frá, hvussu verkætlanir ganga, og hvat komið er burturúr.

So hvørt vit gera okkum fleiri royndir, stinga seg upp ymsir viðkomandi spurningar, sum støða eigur at takast til. Eiga vit at stuðla ávísum heimspørtum ?, eiga vit at stuðla ávísum sektorum, eitt nú heilsu, útbúgving ella fiskivinnu ? og eiga vit at áseta, hvussu nógvan stuðul ávikavist altjóða stjórnarfelagsskapir og hjálparfelagsskapir kunnu fáa.

Neyðugt er áhaldandi at vinna sær vitan og royndir um menningarsamstarv, og at umrøða m.a. omanfyrinevndu spurningar, til tess at gerast álítandi og viðurkendur samstarvs-partur.

Uttanríkisráðið 24. juni 2008

# Endamál og virksemi

Høvuðsendamálið við lógini um altjóða menningarsamstarv er at virka fyri at minka um búskaparliga ójavnan í heiminum við burðardyggum menningarsamstarvi.

Umframt høvuðsendamálið hevur landsstýrið sett sær sum mál at skapa føroyingum og føroyska samfelagnum royndir, kunnleika og áhuga fyri triðja heiminum og altjóða viðurskiftum sum heild.

Fyri at røkka hesum endamáli er avgjørt, at fyrstu árini verður menningarsamstarv útint eftir hesi raðfesting:

1. Menningarhjálp skal bert latast londum, sum OECD skilmarkar sum menningarlond
2. Orka skal leggjast í at byggja upp samstarv við altjóða viðurkendar hjálparfelagsskapir – stjórnarligar sum sjálvbodnar – til tess at vera saman við hesum felagsskapum um menningarverkætlanir
3. Har til ber, skal menningarsamstarvið skapa møguleikar fyri virknari, føroyskari luttøku

ST mælir ídnaðarlondum til at gjalda 0.7% av bruttotjóðarinntøku síni til altjóða menningarsamstarv. Í royndum lata hesi lond bert 0.47% í miðal. ST hevur síðani samtykt, at í 2015 skulu ríku londini halda síni lyfti, og ávegis er sett sum mál, at í 2009 eiga londini at lata 0,5% av bruttotjóðarinntøku síni til hetta arbeiði.

Henda samtyktin hjá ST er einans galdandi fyri sjálvstøðug lond og fevnir tískil ikki um Føroyar. Hóast altjóða samfelagið einki væntar sær av okkum, tykist politisk semja vera um, at Føroyar eiga at seta sær sum mál at lata munandi meiri av bruttotjóðarinntøkuni til arbeiðið. Sum nú er, lata vit 3.5 mió. kr. til menningarsamstarv, sum í 2007 vóru um 0.03% av bruttotjóðarinntøku. Tað fara við vissu at ganga nógv ár, áðrenn vit náa málinum um 0.7% av BTI, sum í dagsins tølum vildi verið 80.5 mió. kr., tó eigur tað ikki at forða okkum at seta sum mál, at økja árligu upphæddina við til dømis 0.02%.

Løgtingslógin um altjóða menningarsamstarv fór úr gildi í mai og 14. mai fingu vit nýggja lóg, løgtingslóg nr. 44 frá 14. mai 2007 um altjóða menningarsamstarv. Kunngerðin um altjóða menningarsamstarv varð lýst í juni, og 1. november varð fyriskipan um virksemi hjá ráðgevandi nevndini staðfest.

### *Virksemi nevndarinnar*

Ráðgevandi nevndin fyri altjóða menningarsamstarv hevur havt 7 fundir í undanfarna ári. Nevndin hevur umrøtt allar umsóknir, og gjørt tilmæli áðrenn niðurstøðurnar eru tiknar.

Av tí at umsitingin er lítil, hevur ráðgevandi nevndin ein sera týðandi leiklut. Vit vita, at snávingarsteinarnir kunnu vera nógvir, og tí er tað alneyðugt alla tíðina at skifta orð um bæði hvørjar verkætlanir vit skulu luttaka í, hvørji krøv vit skulu seta til umsøkjararnar og hvussu uppfylgingin skal vera. Harumframt er neyðugt støðugt at samskifta og byggja

upp sambond og at finna nýggjar samstarvsháttir. Hesin arbeiðsháttur er liður í at byggja upp ein menningarsamstarvspolitikk fyri Føroyar.

Hóast ongar ásetingar eru um, at ráðgevandi nevndin eisini skal veita ráð um neyðhjálp, so hevur nevndin verið kunnað um neyðhjálpina, sum er latin Sudan, Peru og Bangladesh.

Í nevndini eru Marita Rasmussen, forkvinna, stjóri í Vinnuhúsinum, Snorri Brend, næstformaður, blaðmaður, Lars Tostrup, stjóri í Norrønt Atlantssamstarv, Heðin D. Poulsen, løgfrøðingur og Óluva Niclasen, deildarleiðari á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

## *Hvar fer menningarhjálpin ?*

Meginparturin av menningarhjálpini fór í 2007 til lond í Afrika. Londini í Afrika eru Kenja, DR Kongo, Liberia, Senegal og Tanzania. Øll londini uttan Kenja, eru skrásett í tí mest fátæka bólkinum í yvirlitinum hjá OECD. Kenja er í næstniðasta bólki. Afrika er tann heimsparturin, sum er allarfátækastur og flestu umsóknirnar, sum Uttanríkisráðið hevur móttikið, eru til at hjálpa fólkinum í hesum heimsparti.

Nakað av menningarhjálpini er farið til Indonesien, sum var sera hart rakt av Tsunami flóðalduni í 2004. Indonesia er skrásett í bólki tvey, har londini í bólki fýra eru tey mest fátæku. Samstarvið í Indonesia byrjaði í 2004, og roknað verður við, at tað fer at halda fram í 2008. Talan er um tvær verkætlanir. Trygdarmiðstøðin í Klaksvík luttekur í aðrari verkætlanini við frálæru og ráðgeving um trygd á sjónum í Aceh landslutinum. Hin verkætlanin snýr seg um at geva nýføðingum móðurmjólk, og verður stuðla fíggjarliga og við ráðgeving úr Føroyum. Seinna verkætlanini er í høvuðsstaðnum Jakarta.

Harumframt er ráðgeving, um at byggja upp oljuumsiting, latin oyggjalandinum Palau, sum liggur eystanfyri Filipsoyggjarnar. Palau er skrásett í bólki eitt, har londini í bólki fýra eru tey mest fátæku.

Peningurin er veittur gjøgnum sjálvbodnir hjálparfelagsskapir, sokallaðir NGO' arar, tó eru 400.000 kr. ella góð 11.4% av játtanini latin stjórnarfelagsskapinum World Food Programme til mat í Senegal.

Enn er upphæddin Føroyar lata lítil, og tað gevur tí ikki beinleiðis meining at fara í tvítjóða samstarv, har partur av tílíkari avtalu vanliga er, at gevaralandið setur krøv til móttakaralandið um at arbeiða fyri at betra fólkaræði, javnstøðu o.l.

Komandi árini verður tí samstarvað við felagsskapir, bæði stjórnarligar og sjálvbodnar og dentur fer eisini at verða lagdur á føroyska luttøku í verkætlanum. Harumframt er ætlanin at byggja upp skipan, har føroyingar, sum hava ávísa fakliga bakgrund, kunnu fara út í heim at arbeiða. Ætlanin er, at hetta skal verða skipað gjøgnum Reyða Kross.

Eisini verður arbeitt við at binda samstarv millum skúlaflokkar í Føroyum og lond í Afrika. Hetta verður gjørt gjøgnum felagsskapin Plan-International, sum er heimsins elsti hjálparfelagsskapur.

Enn eru vit ung tá tosað verður um menningarsamstarv, og tað er tí alneyðugt støðugt at samstarva tætt við hjálparfelagsskapir, fyri á tann hátt at fáa til vega vitan um evnið í síni heild, og hvørji atlit vit eiga at taka, tá vit gerast partur í eini verkætlan.

Fyrisitingin og ráðgevandi nevndin viðgera støðugt spurningarnir um hvørt ávísir sektorar, ávísir heimspartar ella ávísir felagsskapir o.l. skulu dragast framum aðrar ella ikki. Hetta orðaskifti er við til at búna tilvitanina um menningarhjálpina í síni heild, og gera okkum betri før fyri at velja tær verkætlanir, har Føroyar kunnu gera besta munin.

# Lond

Í 2007 hava Føroyar latið stuðul til og luttikið í verkætlanum í tíggju londum. Samstarvið fevnir um ymisk økir, eitt nú um fólkaskúla, fiskivinnu og um at endurhýsa flóttafólkum.

Samstarvið er skipað við stjórnarfelagsskapir eitt nú heimsmatvørufelagsskapin WFP, undir Sameindu Tjóðum, og hjálparfelagsskapir, vanliga nevnt NGO, sum til dømis Reyði Krossur. Samstarvið er býtt soleiðis, at menningarhjálp er latin seks londum og ráðgeving einum landi. Harumframt er neyðhjálp latin trimum londum.

### *Indonesia - Menning av fiskivinnumarknaði og trygd á sjónum*

Ein knøpp millión er latin til at menna fiskivinnumarknaðin og at undirvísa í trygd á sjónum í Meulaboh.

Trygdarmiðstøðin í Klaksvík er við í verkætlanini, og hon hevur veitt fyrstu ráðgevingina um, hvussu arbeiðið við trygd á sjónum kann fyriskipast.

Meulaboh liggur í landslutinum Aceh á Sumatra í Indonesia. Aceh landsluturin var sera hart raktur av flóðalduni Tsunami fyrra jóladag 2004. Undan flóðaldu vanlukkuni búðu 120.000 fólk í býnum og har um leiðir. Roknað verður við, at áleið 40.000 fólk mistu lívið. Umleið 80 % av býnum varð lagt í oyði.

Mynd: Marius Magnusson



Útróðrarbátar í Meulaboh. Trygdarmiðstøðin í Klaksvík skal undirvísa útróðrarmonnum um trygd á sjónum.

Peningurin verður veittur til Mercy Corps at umsita. Mercy Corps er ein altjóða NGO, ið umsitingin frammanundan samstarvar við.

Peningurin skal nýtast til at menna fiskivinnumarknaðin. Hetta ber m.a. í sær at fiskimenn og seljarar læra seg tilgongdina at hagreiða fisk, læra seg ymsar mannagongdir hesum viðvíkjandi og at læra um innpakking av fiskavørum. Harumframt skal peningurin eisini nýtast til at læra fiskimenn um trygd á sjónum. Hetta ber í sær, at bátarnir verða skrásettir, at fiskimenn læra at røkja motorarnar, læra navigatión og trygd á sjónum, og at maskinmenn læra seg motorrøkt

Verkætlanin endar í september 2008, og í seinasta lagi tríggjar mánaðir eftir hetta, skal Mercy Corps lata Uttanríkisráðnum grannskoðaðan roknskap.

### *Kenja - Fótbóltsskúli*

Í Kenja búgva 32 milliónir fólk. Landið verður mett at vera eitt av teimum londum, sum hevur klárað seg frægast í Afrika. Tó hava vit í seinastuni hoyrt um miklan ófrið. Eins og í fleiri øðrum afrikanskum londum, hevur Kenja stórar trupulleikar við HIV og AIDS.

Í apríl 2007 vórðu 20.000 kr. játtaðar til at upplýsa og kunna um HIV/AIDS í Asembo víkini, sum liggur við Viktoriuvatnið í vestur Kenja. Peningurin verður veittur til Dansk Bold Union og Center for Voksen Uddannelse i Sønderjylland. Hesir stovnar standa fyri eini verkætlan, hvørs endamál er at upplýsa og kunna um HIV/AIDS við at nýta nýggjar og øðrvísi hættir so sum fótbóltsskúla og annað undirhald.

Mynd: Oluf Mortensen




Á fótbóltsskúlanum verður undirvíst um HIV og AIDS

Fótbóltsskúlin er fyri 448 børn og 16 fótbóltsvenjarar. Børnini eru býtt í 16 lið og venja hvønn dag í tvær vikur, 2½ tíma um dagin. Tveir danskir venjarar, ein føroyskur venjari, umframt kenjanskir venjarar standa fyri fótbóltsskúlanum.

Umsóknin er komin frá Oluf Mortensen í Tórshavn, sum er føroyski fótbóltsvenjarin í hesi verkætlan.

Ætlanin er, at venjingin og undirvísingin um eyðkvæmi heldur fram, aftaná at fótbóltsskúlin er liðugur.

Í november fekk umsitingin frágreiðing og myndir frá umsøkjarunum um hvussu átakið, sum var í apríl, hevði gingist.

***DR Kongo - Hús í Kongo***

Demokratiska Lýðveldi Kongo er merkt av áralongum kríggi. Hetta hevur ført við sær, at fólk eru flýdd til grannalondini, serliga Burundi og Tanzania. Tá tey venda heimaftur, eru heim og jørð oftast lagt í oyði, og stórur tørvur er tí á at endurhýsa hesum íbúgvum og fáa teimum møguleikar til aftur at byggja sær livilíkindi.

Samsvarandi umsókn frá ADRA, vórðu 495.000 kr. játtaðar til at endurhýsa heimafturvendum flóttafólki í Suðurkivuøkinum í Kongo. Talið á heimafturvendum familjum úr Tanzania og Burundi er stórt. Roknað verður við, at um 25.000 familjur venda aftur til Kivuøkið í ár. Langa borgarakríggið hevur gjørt landið blóðfátækt, livikorini eru ómenniskjalig og barnadeyðin sera høgur.

Familjurnar fáa jørð, pening at byggja hús, latrinur, vatnbrunnar, sáð at dyrka egna grøði og neyðturvandi útgerð sum køksútbúnað, teppir og mýggjabitanet. Harumframt verður undirvíst í heilsuviðurskiftum, fólkaræði og í friðarligari samtilveru.

Hjálpin røkkur til 110 familjur, sum svarar til eini 660 fólk. Peningurin er veittur til Adventist Development and Relief Agency, stytt ADRA, at umsita. Danska Uttanríkisráðið stuðlar eisini verkætlanini gjøgnum DANIDA við 2,8 mió. kr. Samanlagt er talan um hjálp til 460 familjur, sum er áleið 2.760 fólk.

ADRA samstarvar og samskipar sítt virki við aðrar felagsskapir í økinum, eitt nú Tear Fund, Læknar uttan mørk í Hollandi, Altjóða nevndina fyri Reyða Kross og Norska flóttafólkaráðið.

Ætlanin endar 1. mars 2008 og frágreiðing, saman við grannskoðaðum roknskapi, verður latin í oktober 2008.

Mynd: ADRA



Føroyar hava gjørt tað møguligt at byggja 110 tílík hús í DR Kongo.

***Liberia - Skúli í Liberia***

ABC barnahjálp í Føroyum varð stovnað í 2007 og samstarvar og virkar saman við ABC-barnahjálp í Íslandi. ABC barnahjálp skal útvega fátækum børnum í menningarlondum varandi hjálp við skúla, útbúgving og læknahjálp

Felagsskapurin søkti um stuðul til at byggja skúla í Liberia. Umsóknin varð gingin á møti og góðar 900.000 kr. vórðu játtaðar til at byggja ein skúla nær Monrovia í Liberia. Ætlanin er, at skúlin skal húsa 500 børnum.

Endamálið er at útvega faðir- og móðurleysum og fátækum børnum varandi hjálp gjøgnum skúlagongd, kostarhald, læknahjálp og við at veita bústað. Verkætlanin fevnir sostatt um at byggja skúla, skúlaheim til ávikavist gentur og dreingir, at keypa jørð til jarðarbrúk sum lið í sjálvbjargni, um vegagerð og um heilsustøð, har skúlanæmingarnir kunnu fáa heilsutænastur.

Skúlagongdin hjá næmingunum verður stuðlað gjøgnum faddursskipan, har møguleiki er hjá fólki at tekna seg at stuðla einum ella fleiri børnum.

Arbeiðsloysið í landinum er stórt, og lætt er at fáa arbeiðsmegi. Matthew Zakeuh, stigtakari, leiðir arbeiðið í Liberia í tøttum samstarvi við ABC-barnahjálp.

Í dag eru um 200.000 foreldraleys børn í Liberia. Uttan hjálp uttanífrá hava hesi børn lítlar vánir um skúlagongd og útbúgving.

Føroysk umboð hava vegna ABC-felagsskapin verið og vitjað á staðnum og latið frágreiðing um gongdina í verkætlanini. Teirra fatan er, at verkætlanin gongur eftir ætlan, og at tey hava álit á leiðsluni á staðnum. Harumframt hevur umsitingin í november móttikið frágreiðing og myndir um gongdina við byggingini.

Mynd: ABC-barnahjálpin



Hilda Viderø og Jóannes Johannesen á eftirlitsvitjan í Liberia vegna ABC-barnahjálp

***Senegal - Matur***

Á hvørjum ári sendir World Food Programme, (WFP) út áheitan um at stuðla ymsum menningarlondum, tí tey líða hungur. Í ár mælti WFP til, at Føroyar stuðla verkætlan í Senegal. Málið varð umrøtt og gjørt var av at stuðla WFP við 400.000 kr. Peningurin skal nýtast til eina verkætlan, sum kallast Senegal Country Programmes. Henda verkætlan fevnir um trý ymisk átøk, og fer fram í tíðarskeiðinum 2007-2011, hon er mett at kosta 20 mió. USD og fer at gagna 960.000 fólkum í fimm ár.

Átøkini eru hesi:

- **Undirføðsla.** Endamálið er at fyribyrgja undirføðslu hjá børnum undir 5 ár og at fyribyrgja jod mangul, serliga í økjum har goitre er (sjúka orsaka av jod mangul). Kvinnur, sum geva bróst, og sum hava smábørn, verða eggjaðar til at luttaka í átøkum, so sum at menna børn undir 2 ár, luttaka í undirvísing í heilsu og føðslugóðum mati og at býta út vitaminir o.l. Øll, sum luttaka í átøkunum, fáa mat.

- **Undirvísing.** Endamálið er at stuðla børnum at ganga í skúla. Ætlanin sampakkar við ætlanina hjá landinum um 10-ára skúlagongd. Átakið fevnir um eina heita máltíð um dagin til børn í forskúla og barnaskúla.

- **Matvørukreppa.** Endamálið er at fyribyrgja matvørukreppu og at læra at fyrisita náttúruskapta rávørutilfeingið. Familjurnar eru við í átøkum hjá kommununum og luttaka í arbeiðinum t.d. at gera vegir, brunnar, velta jørð og læra at handfara og umsita tilfeingið. Fyri hetta arbeiðið fáa luttakararnir mat.

WFP sendir ikki einstøku stuðlunum frágreiðingar um gongdina í verkætlanunum. Frágreiðingarnar verða í staðin lagdar á heimasíðuna hjá WFP. Gevarin fær eitt skrásetingarnummar, og kann á tann hátt fylgja gongdini í teim ymsu verkætlanunum. WFP byrjaði í 1996 at gera almennar frágreiðingar á henda hátt, og í dag nýta allir stovnar undir ST sama frágreiðingarhátt.

Mynd: Robert Grossman, WFP



### *Tanzania - Barnagarðsskúli í Kobaha økinum*

Í september var umsókn móttikin um at stuðla barnagarðsskúla í Tanzania. Henda umsókn kom frá Amaliu Danielsen í Tórshavn, sum gjøgnum Mellemfolkeligt Samvirke, starvaðist hjá MYODA í eitt hálvt ár.

Avgjørt varð at játtað umsóknini og at lata knappar 42.000 kr. til barnagarðsskúlan. Á skúlanum ganga 70 børn, av hesum eru 9 foreldraleys. Peningurin er veittur til Mkuza Youth Development Association, stytt MYODA, ið er ein hjálparfelagsskapur.

Peningurin skal nýtast til at keypa undirvísingartilfar, skúlabúnar, køksútbúnað, havragrýn, ið er til eina máltíð um dagin í eitt ár, og til samsýning til kókikonu og tveir lærarar, til el og húsaleigu.

MYODA setti skúlan á stovn í 2004, men av tí at fígging manglar, virkar skúlin á einum minstastøði. Undirvíst verður í støddfrøði, swahili, ítrótti, enskum, almennari vitan og evning hvønn gerandisdag frá 8.00 til 11.30. Tað er krav, at børnini hava gingið í barnagarðsskúla fyri at koma í grundskúla ella primary school, tí tey m.a. mugu duga at lesa.

Mett verður, at menningarvirðið við ætlanini er stórt, tí við einans knøppum 42.000 kr. ber til at reka henda skúlan til gangs fyri 70 børn.

Verkætlanarroknskapur verður latin Uttanríkisráðnum við árslok 2008.

Mynd: MYODA



Nøkur av børnunum í skúlanum avmyndaði saman við Amaliu Danielsen.

### *Palau - Oljuumsiting*

Saman við avstralsku stjórnini játtaðu Føroyar í 2006, 650.000 kr. til ein grunn, ið Heimsbankin umsitur, ið skal stuðla Palau oyggjunum í at byggja upp eina oljuumsiting. Í juni mánaði 2007 fóru umboð fyri umsitingina og Heimsbankan á ferð til Palau fyri at seta fyrireikingararbeiðið í gongd. Ein oljuráðleggingarnevnd var skipað og umboðið fyri

umsitingina og Heimsbankanum løgdu lag á arbeiðið hjá hesari nevnd at byrja kanningararbeiði sítt.

Á heysti í fjør lat nevndin stjórnini frágreiðing, sum hevur verið til almenna hoyring og tjak á oyggjunum. Politisk semja skal nú finnast á Palau um hvussu farast skal víðari at skipa umsitingina, soleiðis at neyðugu fyrireikingarnar kunnu leggjast í ein fastan karm. Ætlanin er framvegis at Jarðfeingi skal veita stjórnini á Palau ráðgeving, møguliga við at tulka seismisk data. Men enn er onki greitt um nær og hvussu hendan ráðgeving ítøkiliga skal fara fram.

### *Indonesia - Verkætlan um móðurmjólk í Jakarta*

Í 2006 játtaði umsitingin eisini at luttaka í eini bróstagevingsverkætlan í Jakarta saman við Mercy Corps. Henda verkætlan var stuðlað beinleiðis við 1. mió kr. og við fakligari ráðgeving úr Føroyum. Tveir ráðgevar vóru í Jakarta í 4 vikur í februar og mars mánaði 2007 og gjørdu innleiðandi kanningar um, hvussu arbeiðið skuldi skipast. Harumframt veittu tey eisini fakliga ráðgeving um serligu atlitini, ið skuldu takast.

Í november var frágreiðing latin, sum lýsir gongdina og úrslit í verkætlanini. Víst verður m.a. á, at um nýføðingar fáa bróstamjólk innan ein tíma eftir føðing, minkar pinkubarnadeyðin við 22%.

Harumframt kann leggjast afturat, at umboð frá Uttanríkisráðnum var og vitjaði høvuðsskrivstovuna í Jakarta í november, og vitjað var tá á sjúkrahúsinum, har arbeitt verður við at fáa mammur at geva bróst beint eftir føðing. Eisini varð vitjað á heilsumiðstøðum, har hildið var fram við ráðgeving um at geva smábørnum móðurmjólk, og tað tyktist sum verkætlanin hevur bjarta framtíð.

Mynd: Jan á Argjaboða



Bjørghild Djurhuus og Jan á Argjaboða ráðgevar, saman við jarðarmøðrum í Jakarta

### *Annað*

Í januar 2007 var ferð gjørd til Danmarkar at vitja nakrar av teimum størstu donsku hjálparfelagsskapunum. Vitjað var á Mellemfolkeligt Samvirke, ADRA, IBIS og Care Danmark. Endamálið var at kunna seg um hvussu hesir felagsskapir arbeiða og at greiða frá ætlanum Landsstýrisins á økinum. Endamálið var somuleiðis at kanna um møguleikar og áhugi var fyri at samstarva við hesar felagsskapir. Fyribils er tað bert ADRA av teimum stóru donsku hjálparfelagsskapunum, sum Uttanríkisráðið samstarvar við.

Í mars 2007 kom umboð fyri Mercy Corps á vitjan í Føroyum. Endamálið var at kunna Landsstýrið um henda felagsskap, sum vit hava so nógv samstarv við og at umrøða møguleikarnar fyri víðkaðum samstarvi.

## Samstarvspartar

***Mercy Corps***

Mercy Corps er ein hjálparfelagsskapur, ið varð settur á stovn í 1982. Fyrsta menningar verkætlanin var í Honduras sama ár. Høvuðsendamálið er at berja niður líðing, fátækaradømi og trælkan við at byggja upp trygg, framleiðandi og ræ ttvís samfeløg. Mercy Corps arbeiðir víða í heiminum og hevur høvuðssæti í USA.

***Center for Voksenuddannelse og Dansk Bold Union***

Center for Voksenuddannelse í Suðurjútlandi í Danmark, stendur fyri verkætlanini fótbóltur og gykl í Kenya. Hetta saman við Dansk Bold Union.

***ADRA (Adventist Development and Relief Agency)***

Adventistakirkjan byrjaði at arbeiða við neyðhjálp stutt eftir fyrsta heimsbardaga og setti á stovn SAWS (Seventh Day Adventist World Service). Felagsskapurin hevur gjøgnum tíðina ment seg, og virkar í dag sum sjálvstøðugur felagsskapur - skilt frá Adventistakirkjuni. Endamálið hjá ADRA er at arbeiða við menningar- og neyðhjálp til tess at stuðla menniskjum í neyð, óansæð húðalit, kyn, og hvat tilknýti tey hava til politikk ella religión.

***ABC-barnahjálpin í Føroyum***

ABC barnahjálp í Føroyum er sjálvsognarstovnur við heimstaði og høvuðssæti í Tórshavn. ABC barnahjálp varð stovnað í 2007. Felagsskapurin hevur sín uppruna í Íslandi, har virksemi byrjaði í 1988. ABC barnahjálp í Føroyum samstarvar við og eftir somu meginreglum sum ABC Children´s International. Høvuðsendamálið er at útvega fátækum børnum í menningarlondum varandi hjálp við skúla, útbúgving og læknahjálp.

***MYODA (Mkuza Youth Development Association)***

MYODA, er ein sjálvboðin hjálparfelagsskapur, sum formliga varð settur á stovn í 2005, tó at hann hevur virkað síðan 2003. Felagsskapurin virkar í Tanzania, og høvuðsendamálið er at menna ungdómin, minka um fátækaradømi og at basa HIV og Aids.

***World Food Programme***

WFP er sjálvstøðugur stovnur undir Sameindu Tjóðum. WFP varð sett á stovn í 1963. Endamálið er at basa hungri og hungursneyð, at betra um føðslu og dygd í mati hjá teim allar fátækastu fólkunum, og at tryggja burðardygga menning á staðnum.

***Reyði Krossur***

Reyði Krossur Føroya varð stovnaður í 1926. Staðfest varð, at tørvur var á, at sjálvboðin kundu veita veikum í hesum samfelagnum hjálp og kunning. Gjøgnum Dansk Røde Kors, eru Føroyar limur í tí største heimsumfatandi hjálparfelagsskapinum, við til at kunna veita og fáa hjálp. Reyði Krossur hevur um 137 milliónir limir.

# Neyðhjálp 2007

Í 2007 hava Føroyar veitt neyðhjálp í trimum umførum. 300.000 kr. vóru settar av á løgtingsfíggjarlógini.

Harumframt vóru 250.000 kr. fluttar frá menningarhjálp til neyðhjálp umvegis fíggjarnevndarskjalið. Henda hjálpin varð veitt Bangladesh.

| Verkætlan | Endamál | Upphædd | Samstarvs-partur | Land | Tíðar-skeið |
|---|---|---|---|---|---|
| Hungur í Sudan | Mat til flóttafólk í Darfur | 150.000 kr. | WFP | Sudan | Mars |
| Jarðskjálvti í Peru | Mat og aðra neyðsynjarhjálp | 150.000 kr. | WFP | Peru | August |
| Ódnin Sidr í Bangladesh | Útgerð sum telt, teppi og køksútbúnað | 250.000 kr. | Reyði Krossur | Bangladesh | November |

# Fíggjarnýtsla

**Útreiðslur menningarsamstarv 2007**

| | |
|---|---|
| **Játtan 2007** | **3.500.000 kr.** |
| Flutt til neyðhjálp | 250.000 kr. |
| **At nýta** | **3.250.000 kr.** |

<u>**Verkætlanir**</u>

| | |
|---|---|
| **Stuðul** | |
| Mercy Corps, fiskivinna og trygd á sjónum, Indonesia | 952.328 kr. |
| Mercy Corps, verkætlan um móðurmjólk í Jakarta, Indonesia | 144.649 kr. |
| CVU/DBU, Fótbóltur móti Aids í Kenya | 20.000 kr. |
| ADRA, hús í Congo | 495.000 kr. |
| ABC, skúli í Liberia | 927.288 kr. |
| WFP, Country Programmes, Senegal | 400.000 kr. |
| MYODA, Barnagarðsskúli í Tanzania | 41.726 kr. |

| | |
|---|---|
| **Gjøld og umsiting** | |
| Ferðaútreiðslur, eftirlitsvitjanir, o.l. | 126.883 kr. |
| Samsýningar | 13.045 kr. |
| **Samanlagt** | **3.120.919 kr.** |

**Útreiðslur neyðhjálp 2007**

| | |
|---|---|
| **Játtan 2007** | **300.000 kr.** |
| Flutt frá menningarsamstarvi | 250.000 kr. |
| **At nýta** | **550.000 kr.** |

<u>**Verkætlanir**</u>

| | |
|---|---|
| Stuðul til Sudan gjøgnum WFP | 150.000 kr. |
| Jarðskjálvti Peru WFP | 150.000 kr. |
| Ódnin Sidr í Bangladesh, flutt frá menningarsamstarv | 250.000 kr. |
| **Samanlagt** | **550.000 kr.** |

# Lóg um altjóða menningarsamstarv

Løgtingslóg nr. 44 frá 14. mai 2007 um altjóða menningarsamstarv

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

§ 1. Henda lóg skal leggja lunnar undir føroyska luttøku í altjóða samfelagnum at minka um búskaparliga ójavnan í heimi.
Stk. 2. Landsstýrið skal virka fyri hesum við at vera við í sjálvberandi menningarsamstarvi til frama fyri menningarlond, smbr. stk. 3. Samstarvið kann vera formligt sum óformligt.
Stk. 3. Í hesi lóg verða menningarlond skilmarkað á sama hátt sum hjá OECD.

§ 2. Landsstýrið kann hava menningarsamstarv við stjórnir í menningarlondum, stjórnir í øðrum londum, altjóða stjórnarfelagsskapir og aðrar felagsskapir, teirra millum føroyskar.
Stk. 2. Samstarvið kann fevna um fakliga ráðgeving og fíggjarligan stuðul til lutvísa fígging av verkætlanum í menningarlandi, har ætlanin er:

1) at skipa haldgóða fyrisiting,
2) at fáa búskaparvøkstur og
3) at tryggja sosial framstig
Stk. 3. Tá ið til ber, eiga føroysk vitan og føroyskur serkunnleiki at verða gagnnýtt og ment í sambandi við slíkar verkætlanir.

§ 3. Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð neyvari treytir og reglur fyri, hvør kann fáa stuðul, og nær og hvussu stuðul verður játtaður. Her eru at nevna krøv til fíggjarætlan, eftirlit, upplýsingarskyldu, roknskap og grannskoðan hjá stuðulsmóttakara og afturrindan av stuðli.

§ 4. Nevnd fyri menningarsamstarv skal geva landsstýrismanninum ráð til at fremja hesa lóg í verki.
Stk. 2. Nevndin hevur formann og fýra limir, sum landsstýrismaðurin tilnevnir at sita í fýra ára skeið.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin ger fyriskipan fyri virksemi nevndarinnar.

§ 5. Henda løgtingslóg fær gildi 30. juli 2007

Tórshavn, 14. mai 2007

Jóannes Eidesgaard (sign.)
løgmaður